# GRØNIR MENN FRÁ PLUTO VUNNU FIRST LEGO LEAGUE

**LEGO** Leygardagin varð First Lego Lige-finalan hildin í høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Klingruni í Hoyvík, og tað var bólkurin »Grønir menn frá Pluto« úr Skúlanum við Løgmannabreyt, sum vunnu - og sum eisini vunnu túrin til skandinavisku finaluna, sum verður í Noreg

Eirikur Lindenskov



»Grønir menn frá Plutu« úr skúlanum við Løgmannabreyt í Hoyvík vunnu Lego-League finaluna leygardagin og skulu umboða Føroyar í norðurlendsku kappingini í Grimstad í Noreg

First Lego League hevur verið hildið fimm ár á rað í Føroyum. Endamálið við kappingini er at vekja áhugan millum børn og ung fyri náttúrugreinum, tøkni og vísind. Liðini kappast eitt nú við Lego-tólum, sum skulu loysa ymsar uppgávur. Harafturat eru framløgur og framførslur á skránni.

Hvørt ár er eitt yvirskipað evni á skránni, sum kappast verður í. Síðstu árini hava nanotøkni, umhvørvi, lívsgóðska fyri fólk við skerdum førleika og flutningur verið millum kappingarevnini.

Evnið í ár er »Body Forward«. Gjøgnum biomedisinska heimin skulu liðini finna fram til hættir at økja um førleikarnar hjá kroppinum, umvæla skaðar og at vinna á arvaligum eginleikum – alt við tí endamáli at liva eitt eydnasamari og sunnari lív.

Hvør First Lego League kapping er býtt í tveir partar: The Robot Game og The Project – tólmennisspælið og verkætlanin. Fyrra spælið snýr seg um at byggja eitt tólmenni, ein robott, sum skal stríðast við aðrar um eina ávísa uppgávu. Verkætlanin snýr seg um eina ítøkiliga avbjóðing, sum granskarar í dag royna at loysa, og liðini skulu so royna seg við nýhugsandi uppskotum til at menna eina loysn.

»Grønir menn frá Pluto«, sum vunnu kappingina í ár, sleppur víðari til norðurlendsku finaluna, sum verður í Grimstad í Noregi.

Seinastu árini hevur ein flokkur av Skála vunnið kappingina, og tað hevur ført tey víða at kappast við onnur. Hesaferð var vinnandi flokkurin av Skála ikki við, og tí varð mett, at talan fór at vera um eina meira opna kapping, sum so næmingarnir av Løgmannabreyt vunnu.

Í finaluni vóru umleið 150 ung millum 10 og 16 ár, og tey vóru rættiliga troytt – men nógvar og góðar upplivingar ríkari, tá tey fóru til hús um fýratíðina seinnapartin.

Ein góður dagur við First Lego League hjá Føroya Tele.

eirikur@sosialurin.fo

**Kappast var í fimm bólkum, og vinnararnir vóru hesir:**

| | |
|---|---|
| **Náttúruvísindi:** | Team Suður, Tvøroyri |
| **Tøkni:** | Bulldogs, Tvøroyri |
| **Profilering:** | Youth Brains, Sankta Frans Skúli |
| **Samstarv:** | Youth Brains, Sankta Frans Skúli |
| **Robotkoyring 1. pláss:** | Buldribassarnir, av Skála |
| **Robotkoyring 2. pláss:** | Grønir menn frá Pluto, Skúlin við Løgmannabreyt |






